# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Útisetatalið nærkast 20

**Jákup í Stórustovu kann væl fáa langar arbeiðsdagar komandi tíðina. Tí útlendski áhugin fyri føroyskum fótbóltsspælarum er alsamt veksandi.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jákup í Stórustovu, sum í nøkur ár hevur rikið NAFA, hevur sjáldan – um nakrantíð – havt so nógv at gjørt, sum hann hevur júst í løtuni*

Í vikuni stóð greitt, at Rógvi Jacobsen komandi kappingarár fer at royna síni fótbóltsevni uttan fyri føroysku landoddarnar. Enn er hann einasti føroyski spælarin, sum hevur skrivað undir eitt skifti til komandi transfer-vindeygað. Hóast tað ikki eru eins nógvir leikarar, ið skifta felag í vetrar transfer-vindeyganum, so er sannlíkt, at aðrir spælarar eisini sleppa at royna eydnuna uttanlands í næstum.

- Tað eru fleiri fyrispurningar frá - eins og samráðingar við -feløgum í samband við fleiri føroyskar spælarar í løtuni. Hvat ítøkiliga fer at spyrjast burtur úr hesum, ber ikki til at siga í løtuni. Men eg fái sagt somikið, at tað sær sera spennandi út, sigur Jákup í Stórustovu, sum er spælaraumboðsmaður.

Meðan Rógvi við sínum 28 árum telist millum teir meira royndu føroysku spælararnar, so tykist útlendski áhugin í aðrar mátar fyrst og fremst at snúgva seg um ungar spælarar. Og her hevur Jákup merkt eina stóra broyting seinnu árini.

- Tað eru serliga tveir lutir, sum hava ávirkan í so máta.

- Tað at vit nú eisini hava eitt U21-landslið er ein stórur fyrimunur hjá spælarunum. Tað gevur teimum trý ár afturat í altjóða høpi, har spælarin kann búnast nógv. Tekur tú seinastu undankappingina sum dømi, so fingu okkara tvær ferðir møguleika at spæla móti spælarum, har fleiri spæla í Seriu A, og tað er sjálvandi við til at menna spælararnar. Og tá úrslitini eisini hava verið somikið góð, økir tað sjálvandi um útlendska áhugan.

- Hartil haldi eg, at føroysk feløg í dag eru nógv meira tilvitað um týdningin, sum tað hevur at geva egnum spælarum møguleikan. Tey vilja nógv heldur hava fatur á einum ungum evnaríkum føroyingi, heldur enn at royna eydnuna við einum útlendskum spælara, sum tey ikki veruliga kenna. Og tað kemur aftur føroyskum fótbólti tilgóðar. Brúka vit aftur U21-landsliðið sum dømi, so vórðu 30 spælarar nýttir í ár, og við einum undantaki vórðu hesir knýttir at annað hvørt einum Formula-hópi ella einum útlendskum felag. Og tað fær ikki verið annað enn positivt, sigur Jákup, áðrenn hann eisini biður feløgum, venjarum og sjálvandi spælarum eini gleðilig jól.

## Metstórur áhugi

Sjálvur fæst Jákup ikki at siga nakað um, hvørt áhugin føroyskum spælarum í dag er størri, enn hann nakran tíð hevur verið. Men við eitt sindur av hepni og hegni kann væl verða, at Føroyar í februar mánaði hava fleiri spælarar uttanlands, enn vit nakran tíð hava havt áður.

Verður Rógvi Jacobsen roknaður við, so umboðar Jákup í Stórustovu í løtuni 17 spælarar, sum royna seg uttanlands. Tá telur listin bæði Adrian og Lucazs Cieslewicz, men ikki Sylla Amed Davy og Paul Clapson, sum helst ikki verða í føroyskum fótbólti komandi kappingarár. Sjálvur vónar Jákup, at tað talið kann líkjast 20, tá transfer vindeygað letur aftur, í februar. Og somikið nógvar spælarar hava føroyingar ongan tíð áður átt uttanlands.



## Fremad Amager hækkar kapitalin

**Sum partur av vakstraræltanini hevur Fremad Amager økt um partpeningin við 3,5 milliónum krónum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er føroyska felagið, Fremad Amager Invest, sum stendur handan megin-partin av kapitalinnsprænginini, sum felagið hevur fingið.

Í tíðindaskrivi sigur Todi Jónsson, nevndarformaður, at kapitalhækkanin er liður í vakstraræltanini. Har er endamálið í fyrstu atløgu at fáa felagið upp í donsku 1. deild. Og innan fá ár skal ein sessur í superliguni gerast til veruleika.

## Tveir nýggir til Fremad

**Í royndunum at styrkja enn meira um hópin hevur Fremad Amager fingið fatur á tveimum spælarum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Týsdagin kundi felagið boðað frá, at teir hava gjørt tvey ára sáttmála við Jacob Josephsen, sum áður hevur spælt við Lyngby og HIK. Talan er her um ein spælara, sum helst verður nýttur á miðvøllinum, men sum eisini er førur fyri at røkja fleiri onnur pláss á liðnum.

Og í dag var greitt, at enn ein spælari kemur til felagið. Hesin eitur Kristoffer Wichmann, og hevur hann fyrr spælt í Køge og AB.

Stjórin í Fremad Amager, Nicolaj Kaas Heilmann, sigur, at teir framhaldandi arbeiða við at styrkja um hópin, sum ætlandi er partur av donsku 1. deild komandi kappingarár. Í løtuni er Fremad Amager á odda í sínum bólki í donsku 2. deild.